


## Dámar avbjóðingar

Brian Kerr er til reiðar at fara í holt við stóru uppgávuna sum venjari hjá føroyska fótbóltslandsliðnum. - Sum ein underdog skalt tú stríðast, og mær dámar væl ta avbjóðingina. Eg veit, at tað er trupult hjá Føroyum at vinna altjóða dystir, men vit fara at gera alt, vit kunnu, fyri at fáa góð úrslit, sigur Brian Kerr. - Mær dámar væl álopsfótbólt, og eg vil gjarna hava, at Føroya skora fleiri mál, men tað skal ikki kosta í verjupartinum, sigur hann. Brian Kerr roknar við, at hann kemur at búgva lutvíst í Føroyum, og fyrsta uppgávan verður at seta seg inn í føroyskan fótbólt. - Eg vil hava teir bestu spælararnar á landsliðið. Eg vil hava spælarar, sum hava ein stóran vilja, og sum eru stoltir av at vera í landsliðstroyggjuni, sigur hann.

# Smæddust ikki burtur




*Ikki ein tann einasti smálutur var eftir at greiða, tá Brian Kerr kom til Føroya, og í morgun vórðu undirskriftirnar so settar á pappírið, sum knýtir íran at føroyskum fótbóltu komandi 30 mánaðirnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað ræður um at seta sær mál og tora at hugsa nóg stórt, sigur Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, nú tað eydnaðist FSF at fáa ein venjara við einum stórum venjaranavni í landsliðssessin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hurðin hevur veri væl og virðiliga afturlatin í tveir mánaðir, men bresturin var hvøllur, tá navnið á Brian Kerr varð tveitt á borðið í FSF-húsinum mánamorgunin.

Talan er á ongan hátt ikki um nakra novisu í altjóða fótbólti, og tað var ein ikki sørt errin Høgni í Stórustovu, sum føroysku fjølmiðlarnir fingu orðið á, tá tíðindafundurin í FSF-húsinum var um at vera av.

- Vit høvdu okkara greiðu vangamynd av venjaranum alla tíðina, og eftir at tað kiksaði fyri tveimum mánaðum síðani, hava vit valt at arbeitt sera stillisliga við eini nýggjari loysn.

- Og her haldi eg, at vit kunnu siga, at vit hava troytt allar møguleikar og allar keldur. Vit hava havt kanska eini 50 nøvn á okkara lista, og so hava vit arbeitt við at fáa júst tann mannin, sum vit vildu hava. Síðani hava vit brúkt Ísak (Mikladal, blðm.), sum eitt slag av under-cover agenti, og hansara arbeiðið hevur verið at fáa allar smálutir upp á pláss. Og tá vit nú hava skrivað undir, eru øll ivamál beind av vegnum, sigur Høgni í Stórustovu.

Og talan verður so hesa ferð um ein útlendskan landsliðsvenjara, sum setir búgv í Føroyum, sigur FSF-forsetin. Júst hetta hevur annars verið nakað, sum fólk hava funnist at, tá útlendskir landsliðsvenjarar áður hava virkað í Føroyum, men eisini tann spurningurin er greiddur, skilst.

## Hetta er eittplett-skot

**Jógvan Martin Olsen vísir á, at úrslitini borga fyri dygd hjá fryntliga íranum, sum hann fleiri ferðir hevur kappast ímóti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrrverandi landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, fegnast saman við FSF um valið av nýggjum venjara:

- Úrslitini tala fyri seg. Brian Kerr megnaði, tá ið hann var venjari hjá U-16 og U-18 landsliðunum at stýra Írlandi til sigur í EM kappingunum. Tað var annars óhoyrt, og tá ið hann var venjari hjá a-landsliðnum, rukku teir upp á 12. pláss á FIFA styrkislistanum, vísir Jógvan Martin á.

Brian Kerr var við írska U-16 landsliðnum á Akureyri í 1998 í NM kappingini, sum føroyska liðið luttók í. Millum føroysku spælararnar ta ferðina vóru Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen.

Eisini á altjóða ráðstevnum hevur Jógvan Martin hitt nýggja føroyska landsliðsvenjaran:

- Hann dugir ógvuliga væl at fara við fólki, og tað er ein góð dygd at hava í hasum starvinum. Eg hoyrdi Brian Kerr siga á tíðindafundinum, at hann ætlar at samstarva við venjararnar hjá feløgunum, og sum venjari hjá Víkingi gleði eg meg at samstarva við nýggja venjaran.

# Sagt í 3. hálvleiki

**Ein partur av sendingini, 3. hálvleikur, sum Rás2 borðreðir afturvið Vodafone-deildini, eru SMS-viðmerkingar frá lurtarunum. Niðanfyri prenta vit nakrar av teimum mongu viðmerkingunum, sum vórðu sendar inn á 559999 sunnudagin. Tey trý ovast nevndu vórðu hesa ferð kosin at vera tey bestu, og fáa skrivararnir eitt útvarpstól frá Vøruhúsinum á Hjalla sendandi fyrsta dagin.**

»Ultras gleda seg til næsta møtið vid Red Dragons, kanska teir klara at ropa meir enn Desperate Housewifes hja Eb/streymi næstu ferð«

»Hvat fært tú um tú parar ein bridgespælara og ein frá føroya symfoniorkestri? Eiler Rasmussen«

»Sídst í 30'unum og still going strong, lættur og sprelskur, sjálvandi er tad Øssur Hansen eg meini ;-)«

»Eftir avriki hja Mike Riley í dystinum hjá United og Aston Villa skilji eg væl, at Riley ikki fær størri dystir enn venjingardystin ímillum Ísland og Føroyar 21.mars í Kópavági«

»Gott at hoyra Hilmar Jan tosa um fótbólt. Ta minnir meg um enn eitt gott kappingarár sum liggur fyri framman. Kom so 07Sørvágur«

»Frensarnir snubladu um halan«

»Altso, eg havi hoyrt um 07 ì skúlakarakteri men 07 vestur! Er tad so betri ella verri en 07 ì skúlakarakteri? «

»Las á hb-síðuni at Øssur var bestur á vøllinum, er hann, sum todi hevur sagt, stórsta talent í Føroyum nakrantíð, ella eru teir yngru bara ikki nóg góðir ?«

»Vatnorkuútbyggingarnar hjá SEV eita Eiði 1, 2 og 3. Tann fjórða skal eita EB/Streymur «

»Føroyingar vísa kærleika: Einki reytt kort í fyrsta umfari.«

»Ein bóltdrongur bleiv spurdur undir dystinum millum nsí-kí, um hann var partur at pilta-liðnum hjá vodafone liðnum hja KÍ«